DAGSINS MEINING

Nýtt ár við tvíbýttari tjóð

Sendingin í útvarpinum um lagnu fullveldisins avdúkaði, at føroyska tjóðin er tvíbýtt av fullveldismálinum. Sendingin avdúkaði eisini, at stendur tað til løgmann og varaløgmann verður uttan íhald stevnt móti fullveldinum hetta valskeiðið. Somuleiðis verður miðað ímóti, at fullt og heilt fullveldi er sett í verk í 2012, um samgonguflokkarnir varðveita valdið. Men full semja var ikki millum báðar teir stóru loysingaflokkarnar. Fólkaflokkurin vil hava búskaparliga trygd fyri fullveldi. Tjóðveldisflokkurin vil hava loysing fyrst, so kemur alt tað búskaparliga av sær sjálvum. Hetta sjónarmið varð stuðlað við at formaður Tjóðveldisfloksins vísti til tilgongdina undir avkoloniseringini. Tað, sum hann í roynd og veru segði var, at skal bíðast eftir búskapinum, so verður einki fullveldi.

Sendingin avdúkaði djúpa ósemju um yvirtøkupoli-tikkin, samstundis sum hon avdúkaði, at kósin verður hildin. Tjóðveldisflokkuirn vil halda fram við yvirtøkum uttan íhald, meðan hinir samgonguflokkarnir tykljast at vera í iva. Til tess at styrkja sína argumentatión hevur Tjóðveldisflokkurin tikið í brúk eina nýggja búskaparliga dimensión: blokkurin verður nú mettur við atliti at føroyska búskapinum og ikki mettur í mun til samlaðu fíggjarlógina. Blokkurin umboðar sostatt bert nøkur fá procent, sum ongan týding hava fyri almenna búskapin.

Vit fara ikki her at taka dagar millum, hvørt hetta er saklig politisk argumentatión. Tað lata vit yvir til lurtaran/lesaran og hinar flokkarnar. Hinvegin loyva vit okkum at vísa á, at føroyska tjóðin enn sum áður stendur tvíbýtt í fullveldisspurninginum. Hetta er í longdini ósunt fyri eina tjóð. Hvussu leingi tola vit sum tjóð og fólk at vera so ósamd um eitt so grundleggjandi mál? Má ein spyrja. Her má vend koma í og liggur stór ábyrgd á samgongu eins væl og á andstøðu í hesum máli. Samgongan má endurskoða sín harðrenda politikk og koma andstøðuni meira á møti. Hetta má hon gera út frá tí einfalda veruleika, at bert ein lítil helmingur av føroyingum veruliga ynskir henda harðrenda fullveldispolitikkin – hetta ikki minst eftir, at tað gerst alt meira greitt, hvør, ið kemur at rinda gildið. Higartil hevur samgongan hóast innanhýsis klandur og ófrið borið seg at sum ein einflokkastjórn í einum ódemokratiskum landi. Maktin tykist vera alt fyri samgonguflokkarnar, tí hanga teir saman hóast ósemju um loysingarleistin. Allar avgerðir eru tiknar uttan fyri tingsins gátt. Politiskt orðaskifti er einki. Innanhýsisklandrið og orðaráttirnir hava bert til endamáls at káva út yvir hendan veruleika. Hvussu leingi tolir eitt fólkaræði eina slíka viðferð? Henda spuring seta mong í hesum døgum.

Hinvegin má andstøðan taka í egnan barm. Higartil hevur hon lagt fram fá verulig alternativ og andstøðan hevur staðið veik í tí sindri av politiskum og principiellum orðaskifti, ið hevur verið. Í mongum førum hava samgonguflokkar virkað sum andstøða til sína egnu samgonga. Tá ruggar ikki rætt. Andstøðan má finna síni egnu bein og seta upp eitt realistiskt og trúverdugt alternativ, sum kann geva teimum demokratisku þortunum av samgonguni ein møguleika at loysa upp fyri tí læstu støðuni. Hendir ikki okkurt, sum líkist hesum, gerst klovningurin bara alt stórri í tjóðini til vit mentalt enda í eini støðu líkari tí í Norðurírlandi. Hetta má ikki henda og tí eiga allar góðar demokratiskar kreftir at umhugsa støðuna í størsta álvara.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Lirka og Lumpa nakað …

Lisbeth L. Petersen
Sambandsflokkurin

So hevði tað nokk loyst seg betur hjá andstøðuni, helt fyrrverandi løgtingsmaðurin Finnbogi Ísakson fyri í sjónvarpssamrøðu sunnukvøldið. Orðingina kenna vit aftur frá tjóðveldisformanni á sinni; ta ferðina tó í einum meira negativum tónalagi.

Í hesi samrøðuni hevði Finbogi hug at geva góð ráð, og hóast alt annað enn samd við Finnboga um partapolitikk má eg viðganga, at tað kann vera áhugavert at hoyra hansara viðmerkingar og meiningar. Ofta speiskar og soleiðis orðaðar, at tær skulu kunna tulkast ymiskt.

Men tá Finnbogi segði, at andstøðan fyri at fáa ávirkan kundi havt lumpað og lirkað nakað í sambandi við fíggjarlógina, ið júst er samtykt, so eri eg rúkandi ósamd. Sambandsflokkurin var og er so dundrandi ósamdur við samgonguna, tí høvuðsendamálið í hesi fíggjarnevndarviðgerðini vóru sparingar fyri einhvønn prís frá samgongunnar síðu, og Sambandsflokkurin gongur ikki við til bert at fáa nøkur tøl at síggja væl út á pappírinum, og so er annars líka mikið, hvussu samfelagið sær út, bara vit røkka einum fullveldi!!

Ongin skal ivast í, at úrslitið av hesi fíggjarlógini verður ein rúgva av eykajáttanarumbønum, sum flestu samgongutingmenn annars hava bedýrað ikki koma uppá tal í framtíðini.

Sparingar funnu vit í andstøðuni, eingin kann siga annað, men teimum vildu samgongulimir ikki atkvøða fyri, sjálvt um fleiri teirra tóku undir við okkum, tá mikrofonin ikki var í nánd.

Eg eri samd við Finnboga, tá hann sigur, at ein politikari eisini skal standa til svars fyri sínum flokki og sínum veljarum, og júst av teirri orsøk kundu vit ikki góðtaka alt. Vit gjørdu tó eina roynd við at seta nøkur broytingaruppskot fram, ið eg eri viss í, fara at koma afturumaftur, men samstundis skal eg viðganga, at broytingaruppskotini kundu verið nógv, nógv fleiri.

Fíggjarlógin 2003

Aftan á at fíggjarlógin er samtykt, og kritikkur er farin at hoyrast, hava vit longu fleiri ferðir hoyrt landsstýrismenn t.d. Bjarna Djurholm og Páll á Reynatúgvu siga, at andstøðan hevur góðtikið allar sparingarnar umframt viðmerkingarnar, tí vit atkvøddu fyri lógini!

Tað er rætt, at Sambandsflokkurin atkvøddi fyri endaliga fíggjarlógaruppskotinum, men tað er so sanniliga ikki, tí vit taka undir við øllum. Eina fíggjarlóg skal landið hava, og har eru mál, sum vit taka undir við, men eg skal eisini vissa samgonguna um, at tá lógarbroytingarnar koma fyri, ið skulu rættvísgera teirra sparingar, so fara teir at síggja, hvar vit standa. Tað hava vit eisini longu gjørt vart við. Eisini fara vit framhaldandi at koma við okkara egnu broytingaruppskotum, og vit byrja longu í januar mánaði komandi.

Nýgg e-bók at fáa

INTERNETBÓK

»Oystercatcher«, eftir David Jutson er skaldsøga at lesa á tínari teldu frá Framtak á Toftum.

»Oystercatcher«, eftir David Jutson, er ein thrillari í fullari longd, sum fer fram í teimum norður atlantisku oljuøkjunum við Føroyar. Heitið kemur av navninum á oljukelduni "Tjaldur 1" sum, í bókini, liggur beint sunnan fyri Suðuroy.

"Mín rødd er kódnað av tí fyrstu av teimum trimum spreingingunum ið skaka boripallin. Øll steðga á í sínum arbeiði og hyggja seg um. Har eru hvørki roykur ella logar men boripallurin tekur ógvuliga spakuliga at halla ..."

Tær drúgvu yrkisligu royndirnar hjá rithøvundanum sum jarðfrøðingur, íroknað tíðin hann hevur arbeitt í Føroyum, er við til at gera hendan dramatiska hugbindara autentiskan.

Frá 1992 til 1998 arbeiddi hann hjá Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS) sum senior jarðfrøðingur við ábyrgd fyri at seta sjøtil á ídnaðarliga biostratigrafi og reinum granskingar verkætlanum har ímillum oljukeldu arbeiði í tí danska Norðsjónum og í Føroyum.

Hann arbeiðir í løtuni fyri RWE-Dea AG sum senior jarðfrøðingur við ábyrgd fyri gransking og oljukeldu jarðfrøði í Norðsjónum, Egyptalandi og álanda Týsklandi.

E-bókin er á eingilskum og inniheldur eisini ein orðalista við oljuvinnu nevnum og kortum.

E-bókin koyrir undir Windows 95, 98, Me, NT, 2000 ella XP og eingin eyka ritbúnaður krevst. Hon fæst at taka niður av internetinum og á fløgu.

Tú finnur »Oystercatcher« á heimasíðuni hjá Framtak á www.framtak.com

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 22050 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggdagad klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Fri. kl. 15	Fri. kl. 12	Fri. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Fri. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nýggjársrøða í Runavík gamlaárskvøld 2002

Kári P. Højgaard
Løgtingsmaður

Fyrst av øllum fari eg at takka tykkum, sum trúðliga hava fyrireikað nýggjárstiltakið her á staðnum. Eg vil eisini nýta høvi at takka fyri, at mær varð víst álit, at halda nýggjársrøðuna í ár.

Hetta er myrkasta ársins tíð, har vit júst eru farin um stytsta dag og náttúran liggur í dvala, dagurin stuttur og náttin long. Tann gamli, góði, gleðiboðskapurin um, at frelsari er okkum føddur, hava eisini ljóða hesi jólini. Ung og gomul hava sitið undir orðinum og sungið jólasangir og glett seg yvir, at okkum untist enn eina ferð at uppliva hátíðina, sum ber av øllum.

So vist sum heimurin stendur vita vit eisini, at tá fari er um stytsta dag, ber aftur móti ljósari tíðum við lýðku, summari og gróðuri. Náttúran vaknar úr dvala, grøs og urtir spretta, fuglurin tekur bjørgini, lombini koma og menniskjan frøist um skapanarverkið og teir møguleikar sum góvust okkum í hesum undurfagra landinum.

Gamlaárskvøld, standandi á gáttini til nýggja ári, er náttúrligt at líta aftureftir og minnast, hvat farna ári gav okkum. Tað er ymiskt, hvussu lagnan lagaði seg hjá tí einstaka og hvat møtti honum í árinum. Nógv okkara hava mist onkran sum stóð hjarta okkara nær, og tí kann tað kanska tykjast trupult at síggja glottar fyri framman. Gamla føroyska orðataki "Maður kemur í mans stað," og "Vit byggja á herðunum á teimum, ið undan fóru", koma eisini við tíðini at sannast fyri okkum, tó at vit ídag illa duga at síggja, hvussu vit kunnu verða tey farnu fyriuttan. Tíðarinnar hjól melur, lívið heldur fram og uppgáva okkara er at arbeiða av fullum huga, meðan tað enn eitir ídag.

Farna ári hevur búskaparliga roynst væl fyri land okkara. Tá alivinnan er undantikin, man hetta vera eitt av teimum bestu innan flestu vinnugreinar og arbeiði hevur verið til allar hendur. Fiskiskapurin hevur verið so góður sum menn ikki minnast, serstakliga hjá teimum smærru bátunum. Fiskur fæst innast av fjarðunum út á ytstu havmið og veðrið við liggjandi lágætt og nærum summarveðri hevur viðført, at ein partur av smábátaflotanum nevnliga bólkur B, hevur brúkt allar sínar fiskidagar og skjótt liggur bólkur D (ikki at misskilja við flokk D) eisini, men vónandi fæst ein loysn á hesum trupuleika beint eftir nýggjár.

Arið royndist serstakliga væl hjá Runavíkar kommunu. Nógv virksemi hevur verið á havnalagnum, við upp og avskiping, so hóast vit í juni tóku nýggja havnalagið Kongshavn í nýtslu, er mangan trongligt við bryggjukantin. Atlantic Supply Base hevur onki virksemi havt í ár tí boriætlanin varð útsett, men komandi ár tá byrja verður at bora, kemur aftur lív í á útgerðarstøðini. Tað skuldu verið møguleikar hjá okkum at veitt tænastur til virksemi hinumegin markið eisini, og vit gleða okkum til aftur at síggja veitingarskipini inni á fjørðinum. Hesi vóru so tíðum at síggja inni, at tey vóru blivin ein partur av gerandisdegnum hjá okkum fjarðbúgvum.

Gongst eftir ætlan verður ein stór farmahøll hjá Skipafelagnum smíða norðast á havnalagnum í summar. Hetta kemur at geva brúkarunum eina enn betri tænastu, samstundis sum greiðari skilnaður verður millum fisk og annan farm.

Stutt fyri jól fekk P/F Beta tveir stásiligar nýbygningar, Bak og Stelk, og er hetta byrjanin til eina endurnýggjan av gomlu Cuba- bátunum, sum hava tænt fyri seg. Eisini Jaspis og Ametyst komu aftur av flatlondum fyri jól har teir hava fingið eina størri høvuðsumvæling í Skagen.

2002 varð besta árið hjá NSÍ nakrantíð, síðan felagið sá dagsins ljós. Tit góvu okkum "Guligans" størstu fótbóltsuppliving nakrantíð, tá ið tit á Ólavsøku vunnu steypakappingina við at sigra á høvuðsstaðarliðnum HB 2-1, umframt at vit vunnu silvur í landskappingini. Túsund tøkk fyri avrikið og góða eydnu við kappingarárinum sum nú liggur fyri frammran.

Eisini í fimleiki og kappróðri vóru heiðursmerkir vunnin.

Somuleiðis fekk landslið okkara sera góð úrslit og serstakliga dysturin í Hannover situr fastur í minninum, tá vara-heimsmeistararnir mundu fingið sín lívs skelk, tá ljóshærdi klaksvíkingurin eftir eina góða fríspæling gjørdist leysur framman fyri málið hjá Kahn. Vit vóru millimetrar frá javnleiki og heimssensatiónini, men bólturin rakti stongina skeivu megin; hetta hava vit møguleika at rætta, tá returdysturin verður á heimavølli.

Innan samferðslu hendir nógv og verða oyggjarnar knýttar tættari saman við betri ferjum og tunnlum. 2002 var árið tá koyrandi var til Vágarnar og tunnilin skotin ígjøgnum til Gásadals. Avgerð er tikin um, at fara undir verkætlanina, at gera undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð. Gongur hetta arbeiði eins væl og tað undir Vestmannasundi, verður koyrandi til Klaksvíkar um 3 ár.

Rundkoyring verður gjørd á Skipaneskrossinum. Stranda- & Oyravegurin halda fram, ábøtur á Norðskálatunnilin gjørdar. Vegagerð í Suðurstreymoy, samfersluhavn Tvøroyri og Syðra-dali. Nýggjur Smyril verður bygdur til Suðuroyarsiglingina og nýggja Norrøna kemur til landið um 5 mánaðar. Fyrsta uppgávan hjá flaggskipi føroyinga verður at virka sum hotellskip við Runavíkar Havn, til stórfingnu fiskarí-messuna, sum Atlantic Fish Fair enn einaferð skipar fyri - mánaðarskifti apríl - maj 2003. Fiskarímessan man vera eitt tað størsta tiltak, sum nakrantíð er fyriskipað í Føroyum, og eydnaðist hon sera væl. Nærum allir teir somu sum luttóku seinast verða við aftur hesaferð, umframt fleiri nýggir so økið verður víðka við einari høll og einum telti. Eitt gott býtislutfall er millum luttakarar uttan úr heimi og heimlig virkir. Vón okkara er, at hendan messan verður eins væleydna og tann seinasta, og kemur at geva fyrireikarunum og býnum eina góða reklamu innan og uttanlandd og at hesin táttur verður afturvendandi annaðhvørt ár.

Farna ári er eins og ein lisin bók, har hvør dagur er at líkna við eina blaðsíðu. Vit kunnu blaða og minnast á hendingar, góðar og minni góðar, men vit hava uppliva hetta og tað kennist trygt og vælkent. Øðrvísi er við árinum sum liggur fyri framman, har alt er hult í tí duldu ókendu framtíðini. Vit vita at lívið ikki bert er ein dansur á rósum, men at mannalívið er havinum líkt, stundum við silvitni, stundum kunnu vit hava undanvind í langa tíð. Tíðir kunnu eisini koma við liggjandi sjaskveðri ella ódn sum kastar lívsfar okkara higar og hagar. Hesum sleppur ongin undan, men okkum nýtist ikki at óttast, tí ongin byrða verður lødd á okkum, sum vit ikki fáa mátt til at bera, um vit leita hjálp á røttum stað.

Vit kunnu her við ársbyrjan lita við frímóði frameftir. Útlitini eru betri enn mangan fyrr, vit hava eitt dugnaligt og virki fólk og hóast onkrir skýloddar hómast á luftini eru ongin orsøk til at stúra. Við Guds hjálp og leiðslu ganga vit við treysti fram. Tá hann er við, hvør kann tá verða ímóti ?

Eg fari at enda at ynskja øllum eitt gott og vælsigna nýggjár, við tøkk fyri tað brátt farna.

Kunningarkvøld um útbúgvingar uttanlands

Altjóða skrivstovan

Mikukvøldið tann 8. januar 2003 kl. 20.00 *skipa Altjóða skrivstovan saman við lestrarvegleiðarunum á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum og á Handilsskúlanum á Kambsdali fyri kunningarfundi um víðari útbúgvingar uttan fyri Danmark. Tiltakið verður í Studenta-skúlahøllini og er almert og ókeypis.*

Allir næmingar við miðnámsskúlarnar, tað veri seg studentaskúla, HF, HHx ella HTx, eins og onnur áhugað, eru væl komin.

Fýra føroyingar, sum allir hava tikið sær útbúgving uttanfyri Danmark, fara at greiða frá:

1 um sínar tankar og ætlanir við at fáa sær útbúgving í ávikavist, Skotlandi, Wales og Teilandi

2 um mannagondina, tá tey søktu, og fíggjarligu viðurskiftini í sambandi við lesturin

3 um góð og trupul viðurskifti í útbúgvingartíðini, bæði av fakligum og sosialum slag

4 um starvsroyndirnar eftir at tey eru komin heim aftur at búgva

5 um hvat tey halda, kann gerast fyri at fáa fleiri at taka eina hægri útbúgving úti í heimi – tað er uttan fyri Danmark.

Eftir at teir fýra gestirnir hava greitt frá sínum hugsanum um útbúgving og yrkisleið verður høvi at seta teimum spurningar og at hava orðaskifti um útbúgvingarviðurskifti.

Síðani fer leiðarin á Altjóða Skrivstovuni í Havn, Holger Arnbjerg, at greiða frá møguleikunum at lesa partvís ella burturav uttanfyri Danmark. Hann fer at viðgera mannagongdina í sambandi við umsóknina, fíggjarviðurskifti og onnur praktisk viðurskifti í hesum sambandi.

Tey fýra, sum fara at taka lut, eru:

Hanna í Horni, 27 ár, PhD-lesandi við University of Wales, Swansee.
Málsligur studentur av Kambsdali í 1995
BSc í antropologi og politiki 1999
MA í altjóða relatiónum 2002 frá University of Wales, Swansee.

Sonja Jógvansdóttir, 25 ár, blaðkvinna á Dimmalætting
Málsligur studentur á Kambsdali 1997
Master of Arts (honours) í politikki við Edinburgh Universitet juli 2002

Hans Jacob Kollslið, 30 ár, lærari á Viðareiði
Skiftisnæmingur við AFS í Teilandi 1988/89
Støddfrøðiligur studentur við Gøtugjógv 1992
Bachelor í "Business English and Marketing" í 1999 fra Assumption University, Bangkok, Teiland

Tummas Pauli Mýri, 28 ár, Menningarráðgevi, "Business Development Advisor", BP Exploration, Tórshavn
Støddfrøðiligur studentur á Kambsdali 1994
BA Hons. 1999 á Robert Gordon University í Aberdeen
Business Economics (MSC) frá Strathclyde University, Glasgow, í 2000
Hevur arbeitt fyri oljufeløg í styttri tíðarskeið í London og Aberdeen.

Fyrireikarar eru:
Altjóða skrivstovan Lestrarvegleiðararnir við skúlarnar á Kambsdali:
Holger Arnbjerg Óli Wolles, Studentaskúlin og HF-skeiðið
ask@ask.fo Karl Olsen og Maria Gregersen, Handilsskúlin
tlf. 322065

Sangkór savnar inn fløskur

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 4. januar skipar Tensing kórið, Sound of Glory, í KFUM&K í Havn fyri fløskuinnsavnan. Farið verður runt í hvørt húsarhald í Havnini **millum kl. 15.00 og 17.00.** Peningurin, ið kemur inn, fer til konsertferð til Prag, har kórið eisini fer at luttaka á stórari altjóða KFUM&K stevnu.